# Posta Stamps

Føroyar Nr. **51**

Februar 2022



Posta
FAROE ISLANDS

**Martin Mörck**
frímerkjateknari

**Norðlýsi**

**Lívrunnin list**

# Norðurlendskur frímerkjasniðgevi

# Martin Mörck



**Martin Mörck á heimaoynni í Svøríki**

Mynd: Armagan Ozdinc




**Yndisfrímerkið hjá Martin: Toskaskræðufrímerkið 2016**

Tann norsk-svenski listarmaðurin Martin Mörck er heimsins virknasti núlivandi sniðgevi og -myndristari. Síðani 1977 hevur hann sniðgivið og/ella myndrist yvir 900 ymisk frímerki, sum eru givin út av postverkum í 28 londum, teirra millum Posta.

Hansara sniðgáva og myndristing prýða 46 ymisk føroysk frímerki og postgjaldsmerki. Harumframt hevur hann sniðgivið og/ella myndprýtt níggju føroysk smáørk.

Martin Mörck er sannur føroyavinur. Ein motorsúkklutúrur, sum var eitt ævintýr upp á seks vikur í Føroyum, tá ið hann var nítjan, var hansara fyrsta uppliving av føroyskum landslagi og føroyskari mentan. "Genta mín og eg pakkaðu eitt tjald og koyrdu til Danmarkar á motorsúkkluni hjá mær til ferjuna til Føroyar. Ætlanin var at vitja hvørja einastu oyggj í Føroyum, har koyrandi var á súkkluni hjá okkum, og tað gjørdu vit so. Vegirnir vóru als ikki í slíkum standi í 1974, sum teir eru í dag, og tí var tað torført at koyra á teimum longu, krókutu vegunum. Nógvastaðni noyddust vit at taka ferju av einari oyggj á aðra, tí tá vóru eingir tunlar oyggjanna millum. Tað var ein framúrskarandi túrur, sum knýtti meg til Føroya við stórum eldhuga, sum er til staðar enn í dag. Síðani tá havi eg vitjað í Føroyum mangar ferðir," sigur Martin Mörck.

Spurdur um, hvat honum dámar best í Føroyum, svarar hann soleiðis: "Náttúran er vill og ónomin. Tað harðrenda landslagið er serstakt og undurfult. Veðrið passar mær sera væl. Fólk eru vinarlig og hava bæði bein á jørðini. Maturin er frálíkur við stórum úrvali av øllum, mær dámar best: lambskjøti, eplum, fiski, grind og fugli."

Martin Mörck fór at arbeiða fyri postverkið í Føroyum eftir at hann hevði hitt Svanbjørg Manai á eini frímerkjaframsýning fyrst í nítiárunum. Av tí at hann var so hugtikin av

Føroyum, vildi hann fegin sniðgeva og myndrista føroysk frímerki. Hansara fyrsta uppgáva var at sniðgeva eina frímerkjarøð um fuglaveiðu. Men tekningarnar til hesi frímerki lógu burturgloymdar í eini skuffu, til tær at enda vórðu prentaðar í 2018. Tað fyrsta frímerkið hjá Martini Mörck um Ólav Heilaga kom út í 1995.

Í mong ár hevur hann sniðgivið og myndrist nógv prýðilig føroysk frímerki. Mítt føroyska yndisfrímerki, sum Martin Mörck hevur gjørt, er smáarkið *Víkingar í Atlantssigling* (2002). Tað meti eg vera eitt av hansara meistaraverkum.

Hvat føroyskt frímerki er so listarmansins egna yndisfrímerki?

"Tað er torført at velja. Frímerkið við tí føroyska knívinum (2017) er eitt av teimum, sum eg eri allarbest við. Tað er mest tí, at eg sjálvur samli upp á knívar, men eisini vegna tað serstaka sniðið á tí føroyska knívinum. Eg var í Føroyum eitt langt tíðarskeið í samband við ta

*Hansara sniðgáva og myndristing prýða 46 ymisk føroysk frímerki og postgjaldsmerki.*

verkætlanina. Eg leitaði eftir einum prunkaðum knívi til frímerkjamynd, og fann ein í einum privatum knívasavni, sum Nólsoyar Páll hevur átt. Men tá ið til stykkis kemur, hugsi eg, at yndisfrímerki mítt millum tey føroysku er toskaskræðufrímerkið (2016). Tað var fyrsta frímerki í søguni, sum er gjørt av ektaðari fiskaskræðu. Eg fann sjálvur uppá og menti hugskotið aftanfyri tað frímerkið," sigur hann.

Tað nýggjasta føroyska frímerki hjá Martini Mörck varð givið út í sambandi við, at drotning Margreta 2 hevur sitið sum drotning Danmarkar í 50 ár. Hann hámetir og virðir drotningina, og tí hevur hann gjørt serliga nógv burturúr hesi týdningar-

Samansett svartprent av fýra ymiskum myndristingum, sum Mörck gjørdi til smáarkið Víkingar í Atlantssigling í 2002.



miklu søguligu útgávu. Tá ið Posta hevði gjørt av, at hetta frímerkið skuldi prentast á eitt smáark, skuldu vit velja eina bakgrund. Eg vildi fegin hava ein pall, sum lýsir Føroya søgu, við grasi, gróti og havi íkring. Tá ið vit høvdu tosað aftur og fram eina tíð, varð Kirkjubømúrurin valdur til bakgrund, og avgjørt varð, at drotningin skuldi sita á grótgarðinum, sum er um múrin, " greiðir hann frá.

"Tað næsta stigið var ein mynd av drotningini, sum skuldi brúkast til at prýða frímerkið. Sostatt máttu myndamaðurin Steen Brogaard og eg fara til Fredensborg slott til myndatøku. Eg hevði ætlað, at drotningin skuldi sita lágt, so at tað sá út, sum hon sat á einum steini. Frammanundan hevði eg gjørt eina blýantsskitsu av smáarksmyndini, sum eg vísti drotningini, til tess at lýsa, hvat eg vildi hava. Drotningin er sjálv listarfólk, og eisini eitt sera klókt fólk. Tí havi eg eisini áður upplivað, at tað hevur verið sera lætt at samskifta við hana og greiða frá, hvat ið mínar listarligu ætlanir eru. Tá ið myndatøkan var liðug og væleydnað, setti eg myndirnar av drotningini og múrinum saman, sum fyrimynd til mína tekning. Endaúrslitið er ein mynd, sum vísir drotningina, sum situr á garðinum, meðan hon nýtur sólina ein góðan summardag í Føroyum. Eg myndristi bert myndina av drotningini við hond, sum er prentað við djúpprenti, meðan smáarkið annars er prentað við offsett."

Martin Mörck leggur dent á, at honum hevur altíð dámað væl at arbeiða við teimum føroysku frímerkjunum, og at hann hevur sett stóran prís upp á tað stóra listarliga frælsi, sum Svanbjørg Manai hevur latið hann havt. Hann gleðir seg til at sniðgeva og myndrista nógv fleiri frímerki fyri Føroyar í framtíðini.

*Armagan Ozdinc*




**Føroyski knívurin, sum Martin greiddi úr hond í 2017**

# Aurora borealis

# Norðlýsi







**Norðlýsi yvir Tindhólmi**
Mynd: Thomas Vikre




**Norðlýsi í Hoyvík**
Mynd: Árni Øregaard

Tað var einaferð seinast í seksti- kanska fyrst í sjeytiárunum, at ein floksfelagi spurdi um vit høvdu sæð marglittu ljósini á hválvinum kvøldið fyri. "Tað er tekin um heimsins enda," legði hann afturat og gjørdist heldur firtin, tá hansara dapri boðskapur ikki vakti annað andsvar enn onkra ypta øksl.

"Tvætl í teg," fekk hann at vita. "Tað var norðlýsið. Hevur tú ongantíð sæð norðlýsi fyrr?"

Men hann helt við sítt. "Nei, tað var nógv verri enn so. Norðlýsið er grønt - hettar var í øllum møguligum litum!"

Vit kveittu upp á hvønn annan og yptu aftur øksl. Tá hatta lagið var á honum, var onki at gera. So vit fóru og lótu hann standa eftir við sínum dómadagstankum. Ávegis úr skúlagarðinum tosaðu vit tó um flotta norðlýsið kvøldið fyri, sum vit sjálvandi høvdu sæð. Og tað var sanniliga ein stórbær sjón.

## Dansandi ljós

Tað kvøldið kom norðlýsið aftur, hesa ferð uppaftur vakrari og ógvusligari. Har var, hóast vakurleikan, okkurt ræðsluvekjandi yvir tí – og sum vit stóðu í flokki har uppi við Hoyvíkstjørn og eygleiddu villa leikin, kundu vit meir enn so skilja ræðsluna hjá okkara smáreligiøsa floksfelaga. Men tað høvdu sjálvt tíggju villir hestar ikki fingið okkum at viðganga.

Langar rásir av marglittum ljósi dansaðu og snúðu seg undir hválvinum – litirnir skiftu frá gulgrønum yvir í grønt, blátt og reytt. Í stjørnuklára kvøldinum var tad, sum ein kendi tær neista og glampa – næstan sum vøguravmagn, tá ein kom til at draga nylonklæði ov brádliga yvir høvdið.

## Sólstormar og sovorði

Hetta var, sum sagt, antin seinast í sekstiella fyrst í sjeytiárunum, tá børn høvdu áhuga í øllum, ið hevði við rúmdina at gera. So hóast vit ikki høvdu tilgongdina heilt greitt fyri okkum, vistu vit, at norlýsi kveiktist tá orkan í sólvindinum mentist í styrki, serliga tá ógvuslig gos, sokallaði "flares" komu fyri á sólini. Tá bitlarnir (partiklar) í sólvindinum raka magnetøkið hjá jørðini, birtist norð- og suðurlýsi við pólarnar, *aurora borealis* og *aurora australis*.

Sterkari sólvindurin er, ógvusligari verður norðlýsið. Tað kyknar í 90 til 300 kilometra hædd, tá orkan í sólvindinum, sum løddir bitlar, raka magnetøkið hjá Jørðini og leiðast inn í atmosferuna umvegis feltlinjurnar, har magnetøkið er sterkast - í eitt belti við pólarnar. Tess ógvusligari útbrotini eru, breiðari verður t.d. norðara beltið og norðlýsið sæst longur suðuri enn vanligt.

## Tilgongdin

Sjálv tilgongdin, prosessin, er tann, at orkuløddar protonir og elektronir í sólvindinum/storminum, stoyta saman við mýlini, molekylini, í atmosferuni og eitt stutt bil geva teimum hægri orkuvirði. Mýl og atomir stoyta síðan avlopsorkuna frá sær aftur, ella fanga eina forskotna elektron innaftur og fella so aftur til upprunastøðið. Tað er hendan prosessin, emissión ella geislan, sum kveikir norðlýsi – og ymsar bylgjulongdir, ið føra til ymsu litirnar. Tá súrevnisatomini (*oxygen*) fella aftur til upprunastøðið, kveikist reytt, gulgrønt og grønt ljós av útskotna tilfarinum. Tá køvievnismýlini (*nitrogen*), eftir at hava verið ioniseraði, fanga eina útstoytta elektron innaftur, kveikja tey blátt ljós – og tá tær fella aftur til upprunastøðið, kveikist reytt ljós.

## Eygnabrýr Ýmirs – Vallgarður Miðgarðs

Ja, eg veit. Veruligar tilgongdir eru keðiligar á skrift. Men eg kann garantera, at fyri okkum, dreingir og gentur, sum stóðu í myrkrinum og eygleiddu norðlýsisdansin, var hendingin alt annað enn keðilig. Eg havi mangan sæð norðlýsi, bæði fyrr og seinni, men onki kemur í námind av kosmisku sjónini ta kvøldið í sekstiárunum.

Tað kveikti sanniliga hugflogið – og vit vóru ikki tey fyrstu ið kendu fjáltur og lítillæti av sjónini. Okkara fjaru forfedrar, víkingarnir høvdu teirra egnu útlegging av fyribrigdinum:

Tá Óðin og brøður hansara í fyrndardøgum drupu frumrisan Ýmir, bygdu teir tann sjónliga alheimin av risarovunum. Mitt í hesum, løgdu teir Miðgarð, har menniskjuni búgva. Kring Miðgarð løgdu teir ein vallgarð, ið skuldi verja mannaheimin móti jøtnum og trøllum. Hesin vallgarður var evnaður til av eygnabrúm Ýmirs – og stundum kann man síggja hárini bleiktra undir hválvinum. Hetta kalla summi norðlýsi.

Okkara grannar vestanfyri, grønlendingarnir, hava arvað eina minst líka marglitta frágreiðing frá teirra forfedrum. Gomlu inuittarnir vistu at siga, at norðlýsi í roynd og veru stóðst av at tey deyðu spældu bólt undir hválvinum.

## Og tó – heimsins endi?

"Tað er tekin um heimsins enda," segði okkara fjálturstungni floksfelagi. Hvørki hann ella vit onnur, høvdu minstu hóming av, at dapri spádómur hansara hevði verið óhugnaliga nær við at ganga út.

Tann 23. mai 1967, kom bráður fjáltur á amerikonsku herleiðsluna. Kalda kríggið

millum eystur- og vesturheimin stóð upp á tað harðasta, tá amerikanska radarskipanin brádliga brendi saman. Amerikanar hildu, at tað var sovjetiska hernaðarvaldið, ið jammaði teirra radarar og óttaðust at eitt sovjetiskt kjarnorkuálop var byrjað. Allar alarmklokkur ringdu og amerikanar fyrireikaðu eitt umfatandi mótálop við kjarnorkuvápnum, tá okkurt gløgt høvd fekk hugskotið, at spyrja vísindafólk um atmosferiskt ólag kundi vera atvoldin til óskilið. Astronomar, sum stutt frammanundan vóru farnir í holt við at eygleiða sólarvirkni, kundu tá upplýsa, at eitt umfatandi útbrot júst hevði verið í sólarkransinum og at ein óvanliga harður sólstormur hevði rakt Jørðina. So ógvusligur var sólstormurin, at elektronisk útgerð um allan heim brendi saman, eisini amerikanska Early Warning skipanin.

*Sterkari sólvindurin er, jú ógvusligari verður norðlýsið.*

Hevndarálopið varð avlýst og heimurin slapp frá kjarnorkuelvdum ragnarøkum - men tað var um eitt hár gjørt.

Minnist meg rætt, so var tann ógvusligi sólstormurin og glæsiliga norðlýsið vit upplivdu hetta kvøldið, seinni enn í 67. Men eg eri ikki heilt vísur í tí.

Eri í hvussu er glaður fyri, at floksfelagin ikki endaði sum profetur.

*Anker Eli Petersen*



Fyrsta bókin á føroyskum 1822:

# "Færøiske Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans ætt"




Í 1822 bleiv fyrsta bók á føroyskum prentað. Tað var H.C.Lyngbye, sum gav "*Færøiske Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans ætt*" út.

Teksturin var eitt kvæði, skrivað eftir munnligari frásøgn, sum hon vísir seg í føroyskum dansi, sum er samansettur av søgu, sangi og rørslu, við skiparanum sum høvuðsleikara í dramatiskum samanspæli við dansararnar.

Fyrst í 1800 talinum var vaksandi áhugi millum skúlað fólk fyri fornfrøði og fyri fólksins siðvenju. Kvæði og sagnir vórðu skrivað niður, ritstjórnað, útgivin og ofta havd sum evni í neyvum akademiskum lestri, sum lá langt burtur frá fólksins litføgru siðvenju. Hesir tekstir fingu avgerandi týdning fyri samleikakenslu føroyingsins og eiga eisini sín part í, at dansurin livir enn í dag.

## Arbeiðið hjá Lyngbye vakti stóran ans

H.C. Lyngbye, sum var úr Eysturhimmerlandi í Danmark, var nýútbúgvin prestur í Keypmannahavn, men hann var eisini náttúruvísindamaður við áhuga fyri plantufrøði. Tessvegna fór hann eina náttúrufrøðiliga savningarferð til Føroya í 1817, og tá kannaði hann fyrst og fremst tara, men hann savnaði eisini nógv annað føroyskt tilfar.

Til dømis hevði hann áhuga fyri fornfrøði og máli og skrivaði ymiskt niður, sum dømi um føroyska sangsiðvenju. Millum annað 164 kvæðaørindi, sum ein gamal maður í Havn sang. Tá ið hann kom heim til Keypmannahavnar, vísti Lyngbye

gudfrøðinginum og kvæðagranskaranum P. E. Müller hesi ørindi, sum varð bæði bilsin og fegin, tá ið hann sá, at kvæðaevnini hoyrdu til víðagitna Nibelungenlied, Eddukvæði og Vølsungasøgu.

Tað vakti stóran ans, at partar av hesum víðagitna kvæðabólki vóru varðveittir munnliga í Føroyum. Til tess at fáa hjálp at savna tað, sum eftir var av kvæðinum um Sjúrð ormsbana, skrivaðu Müller og Lyngbye til føroyingin J.H. Schrøter, prestin í Hvalba, sum Lyngbye hevði vitjað á síni savningarferð í Føroyum.

## Fyrsta útgáva á føroyskum

Í umleið eitt ár savnaði Schrøter restina av kvæðinum og sendi í 1819 øll ørindini til Lyngbye, sum tey komandi árini fór at skipa tað nógva tilfarið.

Hesa tíðina var einki góðtikið føroyskt skriftmál, Lyngbye brúkti sostatt ta rættskriving í sínum handriti, sum tann lærdi J. Chr. Svabo hevði lært hann, tá ið hann var í Føroyum í 1817. Donsk umseting eftir Lyngbye stendur aftaná tey føroysku ørindini, síðu fyri síðu gjøgnum bókina.

*Tað vakti stóran ans, at partar av víðagitna kvæðabólkinum vóru varðveittir í Føroyum.*

Bókin er 592 síður við fororði eftir Lyngbye og inngangi eftir P. E. Müller, og aftast er eitt nótaark við kvæðalagnum. Útgávan fekk stuðul frá kongsins "*Grunni ad usus publicos*".

## Byrjandi føroysk tjóðarbygging

Hesa tíðina breiddi tjóðskaparhugsan seg millum mentafólk og lærdómsstættir í Evropa, sum høvdu ta áskoðan, at siðvenja, tjóðarmál og fólksins eyðkenni skuldu vera støði undir samleika, landamørkum og til endans politiskum valdi. Av tí vórðu fólksins egnu kvæði, sagnir og onnur munnborin fólkaminni sera týdningarmikil at finna og skriva upp.

Tann føroyska kvæðabókin bleiv ummæld av tí víðagitna málfrøðinginum

**Útgávan hjá H. C. Lyngbye av fyrstu bók á føroyskum 1822 við 592 síðum. Her sæst tittulblaðið.**
Mynd: Ole Wich



og fólkaminnissavnaranum Wilhelm Grimm. Hann var úrmælingur í fólkaminnisgransking, týdningarmikil fyri tjóðarbygging í Týsklandi og kendur um alt Evropa. Ummælið hjá Grimm gjørdi, at lærd fólk fingu størri áhuga fyri føroyskum mentanaravrikum tey komandi árini. At bókin kom út gjørdi eisini, at føroyingar fóru at savna kvæði í Føroyum.

Tá ið munnmentir blivu niðurskrivaðar, givnar út í bók og sostatt rukku út til størri lesaraskara, vaktist ansur fyri føroyskum kvæðum. Somuleiðis vaktist ein byrjandi fatan av, at føroyskt skuldi síggjast sum eitt sjálvstøðugt mál.

## Byrjandi føroyskar bókmentir

Bókaútgávan hjá H.C. Lyngbye í 1822 er tískil ein varði í føroyskari tjóðarbygging, av tí at hon elvdi til vaksandi áhuga fyri føroyskari mentan bæði í Evropa og í Føroyum og var prógv um, at tað var neyðugt at skapa eitt nýtiligt føroyskt skriftmál. Tað kom í 1846 og gjørdist fortreytin fyri teimum víðfevndu føroysku bókmentunum, sum síðani eru komnar út.

Tí fekk útgávan stóran týdning fyri at menna nútíðarinnar uppfatan av føroyskari tjóðarmentan, har ið móðurmálið, føroyskt er ómissandi grundarlag undir føroyskari mentan og undir samfelagnum.

*Ole Wich*

Presturin J. H. Schrøter savnaði størsta partin av Sjúrðarkvæðunum. Hetta er hansara upprunahandrit, sum liggur á Kongliga bókasavninum.


Færöiske Qvæder
1818
1819
1822

## Smáarkið “Fyrsta føroyska bók 200 ár”

Frímerkjaútgávan 200 ár eftir fyrstu føroysku bók er eitt smáark við tveimum frímerkjum. Frímerkið vinstrumegin við virði 29 kr. sipar til Sjúrðarkvæðið og vísir føroyskan dans, sum liðar seg livandi fram ímóti orminum Frænir við nótablaðnum sum baksýni.

Á hinum frímerkinum við virði 43 kr. ganga dansurin og ormurin yvir í niðurlagið við síðuna av tittulblaðnum á bókini. Baksýnið

*Føroyska kvæðabókin bleiv ummæld av víðagitna málfrøðinginum Wilhelm Grimm.*

á arkinum er J.H. Schrøtersa upprunahandrit til bókina.

Tað er listamaðurin og søgufrøðingurin Ole Wich, sum hevur lagt frímerkjaútgávuna til rættis og sniðgivið.



# Europa 2022

# Flotoyggjar







**Súgvin á veg til Svínoyar**




**Risin í ferð við at flyta Mykines**

Útgávudagur: 16.05.2022

Design: Anker Eli Petersen

Í nógvum oyggjasamfeløgum finnast hugmyndir um sokallaðar flotoyggjar. Oyggjar, sum onkursvegna koma rekandi uttan av havi, hvørva aftur, ella taka botn og verða partur av oyggjabólkinum, ofta orsakað av gandi ella líknandi atgerðum av fólki á staðnum.

Í so máta eru Føroyar onki undantak. Flestu smáu oyggjarnar hava okkurt slag av flotoyggjasøgn knýttað at sær. Í verkinum " FÆROAE ET FÆROA RESERATA" frá 1673, lýsir Lucas Debes fyribrigdið og metir at talan helst er um ísfjøll, sum reka framvið oyggjunum, ella "*Diefvelens Spøgeri oc Forkogleri, hvilcken i sig selff ellers er en tusindfold Konstner*."

Øldina eftir, í 1781 – 82, vísir upplýsingarmaðurin J. C. Svabo, gitingunum hjá Debes aftur og vísir til rekandi klettalík skýggj í sjónarringinum og pollamjørka, ið rekur framvið oyggjunum.

Ongin ivi man vera um, at Svabo var á rættari leið. Ein og hvør, ið hevur staðið og eygleitt pollamjørkan, tá hann rekur framvið ella yvir smáu oyggjarnar, fær kensluna av at tað er oyggin sjálv, ið rekur eftir sjónum og gjøgnum mjørkan. Men veruleikin er sjáldan líka so undirhaldandi sum gott skrøgg, so her halda vit okkum til marglittu frásagnirnar úr sagnarheimi – og siga frá tveimum dømum um oyggjar, ið eru komnar rekandi uttan av havi, við fjøllum og dølum, grísum og risum í fylgi.

## Flotoyggin Svínoy

Tað er manna søgn, at Svínoy, sum aðrar av oyggjunum, var flotoy av fyrstu tíð. Hon kom upp fyri norðan, men sást sjáldan av fólki, tí at hon førdi sum oftast toku við sær, og var sjálv huld í mjørka. Nú skal sigast frá, hvussu til bar, at hon varð føst oyggj.

Í bygdini Viðareiði á Viðoynni áttu menn eina súgv, men ongan gølt, og tó varð súgvin kviðin á hvørjum ári og átti grísar. Allir undraðust mikið á hetta, og kundu ikki fáa skil á, hvussu hetta bar til. Fólk søgdu nú, at tey høvdu saknað hana stundum úr bygdini, men at hon tó altíð var komin skjótt aftur.

Ein dagin fór hon kvikliga eystur gjøgnum bygdina og yvir um eið móti Eiðsvík. Ein kona fekk fatur á henni og bant lyklakippu upp í halan á henni. Súgvin fór á sjógvin og svam frá landi.

Nakað eftir hetta síggja menn á Viðareiði oyggj koma undan sunnanvert á eiðinum. Teir manna sum skjótast út bát og rógva at oynni, og nú kundu teir bæði finna hana og lenda á henni. Tá ið súgvin hevði borið jarn á hana, festist hon, og straks lýsti í mjørk-anum, sum hevði ligið um hana. Og har hevur hon ligið síðan.

*Flotoyggjar 1673: Helst ísfjøll, sum reka framvið oyggjunum.*

Men teir kallaðu hana Svínoy, av tí at hon var full av svínum, tá teir komu út á hana, og svín hevði fest hana í botn, so at hon ikki var flotoy longur. Úti á henni var tað, at Viðareiðissúgvin hevði søkt sær brund.

*(Úr: Færøsk Anthologi af V. U. Ham-mershaimb, København 1891)*

## Flotoyggin Mykines

Í einari aðrari søgn verður sagt frá um ein risa, sum einaferð í fyrndini ætlaði at seta búgv í Føroyum. Men tær oyggj-ar honum dámdi best, vóru ov smáar.



**Svínoy**
Mynd: Pól Sundskarð

Hann avgjørdi tí at leggja fleiri saman. Fyrst tók hann Koltur og legði hana har hon nú liggur. So fór hann eftir Skúvoy og ætlaði at draga hana upp móti Koltri. Men Skúvoyingar spurdu, um hann í álvara ætlaði sær oynna, ið Kálvur lítli hevði átt. Tá risin hoyrdi at ein kálvur hevði átt oynna, vildi hann ikki hava hana, takkaði skúvingum fyri at hava sagt honum frá, gav teimum stórar gávur afturfyri og fór síðan vassandi norður um land.

Har uppi fann hann eina stóra oyggj, sum honum dámdi. Hann skumpaði hana fyri sær suðureftir havinum, men tá hann kom fyri vestan, áraka Vágar, sat fast hjá honum. Hann lá um eina viku og baksaðist við at fáa oynna suður til Kolturs, men hon vikaðist ikki. At enda gjørdist hann so óður, at hann tók til:

*"Fjør mítt, fjør mítt! Hevði eg fingið oynna upp fyri, fekk eg væl hesa undir kav."*

Um hann ikki kundi búgva har sjálvur, so unti hann ongum øðrum Mykines.

Tað kemur fyri, at sørvingar síggja eina oyggj norðanfyri Vágar. Høg fjøll, djúpir dalar og hvítir fossar síggjast á henni. Tá mykinesmenn frætta at oyggin aftur hevur verið í eygsjón, eru teir í døpurhuga. Hvør veit? Kanska livir risin enn og ætlar at søkkja Mykines, so hann fær flutt flotoynna suður til Kolturs at liggja.

*(Leysliga eftir: Færøsk Anthologi af V. U. Hammershaimb, København 1891)*

*Anker Eli Petersen*




**Sjálvklistrandi hefti við 3 x 2 frímerkjum**



*Kanska livir risin enn og ætlar at søkkja Mykines.*

**Mykines**
Mynd: Ólavur Frederiksen

Tríggjar listarkvinnur

# Lívrunnin list







**Útgáva 16.05.2022**
Babyboom, 1997




Ársverk, 2010

Hendan frímerkjarøðin vísir verk hjá trimum listarkvinnum, ið hvør á sín hátt, hvør við sínum teknikki og tilfari skapa fjálgandi verk, tengd at føroyskari náttúru og føroyskum tilfari.

Vit eru so von við náttúrulýsingar og bygdalýsingar í føroyskari list. Men í hesum verkum er náttúran sjálv tilfarið, og hyggjarin følir og luktar blómur, ull og tara. Tað mjúka og tað hála, tað sterka og hvassa, tað fagurt reyða og tað fløskugrøna.

At veva, binda, seyma og brodera er túsundáragomul list, ofta undirmett og yvirsæð. Men kanska broyting verður smátt um smátt í so máta. Seinasta heyst var ein framsýning við vovnum verkum í Klaksvík, har allar hesar tríggjar listarkvinnur vóru umboðaðar. Eitt rák í okkara tíð tykist vera áherðsla á stuttflutt tilfar, endurnýtslu og náttúruverju, eisini í listini, og Jórunn, Astrid og Tita umboða allar hetta rákið.

## Astrid Andreasen (f. 1948)

Astrid hevur í sínum arbeiðslívi sum vísindaligt listarfólk verið í sera tøttum sambandi við náttúruna. Hon er heilt serstøk í


Astrid Andreasen

føroyskum høpi við sínum neyva ansi fyri staklutum, sum vit síggja í tekningum hennara av smákyktum, fiskum og blómum. Astridsa verk prýða eisini fleiri almennar stovnar og ikki at gloyma altartalvuna í Vestmanna kirkju.

Astrid er eisini tikin úr leikum í broderíi og binding. Og hennara list hevur eisini ein samfelagsligan vinkul - arbeiði á sjógvi og landi og menniskjuni. Troyggjurnar (*Babyboom* 1997) eru sera ímyndaríkt verk, umboðandi fólkið, komandi ættarlið, føroyskt handverk og føroyskt tilfar. Og troyggjurnar eru allar samanbundnar til eitt ovurstórt plagg, eins og alt livandi er sínamillum treytað. Og hitt verkið (*Ársverk* 2010) - ein gomul ár við einari langari bundnari línu, sum er  eitt ár - 365 metrar - til longdar, og eini fullari snældu. Árin er gjørd í Vestmanna í 1940unum og er nú partur av listarverki. Árin, bjargalínan og tógvið eru ein lýsing av arbeiði, sum átti lívið í føroyingum, verkið er fagnaður og viðurkening av seiggi og stríði føroyinga á sjógvi og í bjørgum.

> *At veva, binda, seyma og brodera er túsundáragomul list, ofta undirmett og yvirsæð.*

Episkur dámur er í hesum verkum við staklutum og søgum, sum hyggjarin fær við sær.

## Jórunn D. Poulsen (f. 1949)

Jórunn Dánialsdóttir Poulsen hevur ment seg áhaldandi øll árini, síðani hon byrjaði sum listarfólk í sjeytiárunum, menningin og broytingin heldur fram, skiftandi millum figurativt, ikki-figurativt, og aftur figurativt. Frá patchwork, áseymaðum myndum um brúkslist og til broderí og endurnýtslu, hetta seinasta er so sera væl gjørt í teimum koddum, sum varðveita gamalt broderí, sum kvinnur hava brúkt hundraðtals tímar uppá. Sum undirvísari í mong ár hevur Jórunn lagt støði undir verk hjá mongum skapandi fólki í Føroyum.






Broderað mynd




Seymað mynd




Røtur




Sjónotur

Myndirnar, ið eru avmyndaðar, eru ein broderað mynd (2021) við reyðum blómum og fagurt grønum hvøssum leggi og ein seymað mynd (2011) við ljósareyðum blómum á gulum leggjum. Øsandi reytt og fagurt grønt á aðrari og á hinari dramatisk litadýrd og hiti.

Hin hondseymaða myndin við sýruleggjum, (ella er tað lupinir?) við teimum  trivaligu fronsku knútunum, sum byggja ta framskornu blómuna, fær dýpd av tí spegilsmynd sum sæst undir blómunum, og sum samstundis ger myndina livandi, og tann svarta bakgrundin av vadmali dregur motivið fram.

Hóast tann áseymaða myndin er 10 ára gomul er hon sera aktuell. Tær brandgulu og reyðu aldurnar hava næstan tikið ræði á tí bláa himmalinum, og rósurnar toyggja seg úr vatni upp í eld. Tann serligi teknikkurin ger bakgrundina livandi við smáum rukkum, sum skerast av stikningum, ein serstakliga livandi ella ørkymlandi dámur. Tú hoyrir logarnar bresta og brima – ella ein serstakliga vøkur summarnátt?

Poetiskur dámur er í verkunum, báðar myndirnar eru sansaligar, bæði sinnisliga og evnisliga.

## Tita Vinther (1941- 2019)

Tita fekk Mentanarvirðisløn landsins 2005, og hon varð heiðrað eftir deyða sín, tá ið eitt av flogførunum hjá Atlantsflogi fekk navnið Tita eftir Titu Vinther. Av sonnum væl uppiborin heiður, tí at Tita var undangongukvinna.

Bæði hennara tilfar og hennara motiv eru slóðbrótandi. Tita bleiv kend fyri at veva hár og rossatagl saman við ull, og mong mundu stúrsa við, at menniskjahár var at finna í verkunum. Men onkusvegna er tilfarið boðskapurin, menniskjað er við í verkinum, menniskjað, sum partur av størri heild.

Verkini hjá Titu, sum eru vald til hesa røð, eru skulpturell. Nógv av hennara verkum eru júst verk, sum standa ella hanga leys og brúka rúmið og ljósið. Teknikkurin er fyrst og fremst veving, men hon hevur eisini riðað, rørt og knýtt.

Verkið *Røtur* (1982) eru brúnir togendar á brúnari grund, umvavdir ella rørdir við heimaspunnum tógvi. Sera livandi røtur, sum ringja seg ymsan veg og enntá leita sær veg út úr

myndini. Botnurin er teinutur í ymsum brúnum og gulum frábrigdum, eins og jørðildi okkara alra er ymiskt og elur ymiskt av sær.

Hitt verkið er *Sjónotur*, bulurin er vovin og skeggið er rossafaks. Ymiskar til hæddar og í ymiskum litbrigdum, brúnt, reydligt, gul-dæmt og skeggið ymiskt myrkt ella ljóst ella bæði myrkt og ljóst. Sjónotan veksur í havsins urtagarði, eitt av mongum undrum í skaparverkinum.

Bæði verkini lýsa slíkt, sum vanliga er ósjónligt, á havsins botni ella undir moldum, ein áminning um, at eisini umhvørvið, sum vit ikki síggja, hevur ein leiklut í okkara lívi.

*Bergljót av Skarði*

> *Tita bleiv kend fyri at veva menniskjahár og rossatagl saman við ull.*

*Keldur:*
*Trine Rytter Andersen: Fiskadukkur og tussafiskar.*
*Inger Smærup Sørensen: Livandi list.*
*Anne-Kari Skarðhamar: Tita Vinther.*


Jórunn D. Poulsen


Tita Vinther

Sepac 2022

# Drykkjuvørur







**Sepac 2022**
Á frímerkinum sæst Símun í Vági umframt bryggjaríið, sum tað sá út áðrenn 1936.

Útgáva 16.05.2022
Listarfólk: Anker Eli Petersen

Myndevnið fyri ársins SEPAC – útgávu er "staðbundnar drykkjuvørur" – og í Føroyum slepst ikki undan at nevna fremsta virkið á økinum, bryggjaríið Föroya Bjór í Klaksvík, sum nú í brátt hálva aðru øld hevur veitt føroyingum drykkjuvørur – øl og sodavatn av ymsum slag – og her, seinastu árini eisini destillerað bryggj.

## 1888 – Símun í Vági

Í 1888 fór tá 20 ára gamli Simon Frederik Hansen, Símun í Vági, til Danmarkar, at læra til bakara. Meðan hann var niðri, lærdi Símun, umframt bakarayrkið, eisini at bryggja øl.

Heima í Føroyum aftur, í 1888, stovnaði Símun egnan handil og bakarí – og longu sama ár fór hann undir at bryggja egið øl heima í kjallaranum í Vági. Akkurát hvat slag slag av øli talan var um, og hvussu tað royndist, meldar søgan onki um – men ivaleyst var bjóríð gott og hampuliga sterkt, tí hetta varð byrjanin til Föroya Bjór, sum eftirhondini mentist til fremsta og størsta bryggjarí í Føroyum.

Símun í Vági var ein virkin og skapandi maður. Umframt at vera handilsmaður, bakari og bryggjari, var hann eisini bóndi og reiðari. Hann teknaði sjálvur ikoniska búmerkið hjá Föroya Bjór, veðrin, sum hvørt mansbarn í Føroyum kennir.

## Skot fyri bógvin

Orsakað av vaksandi trupulleikum við alkoholismu í kjalarvørrinum á nýggju fríhandilstíðini, vaks fráhaldsrørslan seg stóra og sterka í Føroyum við fyrra aldarmót. Eftir fólkaatkvøðuna um nýggja rúsdrekkalóg í 1907, var ikki longur loyvt at bryggja øl sterkari enn 2,7 prosent í Føroyum. Hetta førdi við sær at Föroya Bjór og onnur føroysk bryggjarí, bara kundu framleiða lætt pilsnarøl og maltøl. Paradoksalt nokk, kundu føroyingar innflyta sterkari øl úr Danmark, teir skuldu bara ikki bryggja tað

sjálvir. Sama var galdandi fyri vín og brennivín.

Sum steinur oman á byrðu, gjørdust tíðirnar alsamt verri. Undir fyrra heimsbardaga var støðan hættislig í Føroyum, sum í heiminum annars. Í 1929 kom stóra skrædlið á Wall Street, sum førdi til enn eina heimsumfatandi fíggjarkreppu, sum helt sær langt upp í tríatiárini. Ringu tíðirnar raktu sjálvandi eisini lítla bryggjaríið í Klaksvík, men tað eydnaðist tó Símuni at halda virkið gangandi.

## Einar eldri

Í 1935 doyði Símun í Vági. Hann og konan, Karin, høvdu fingið 8 børn – og tað var fjórði í flokkinum, Einar Fróvin Waag, sum tók við leiðsluni av bryggjarínum. Sonurin hevði arvað framsýnta og virkna sinnalagið hjá pápanum – og longu árið eftir, í 1936, keypti hann maskinur til sodavatnsframleiðslu frá Smæruni í Havn.

Framleiðslan av sodavatni var tann tiltrongdi stirðil, ið Föroya Bjór hevði fyri neyðini – og undir leiðslu av Einari, mentist

*Í 1907, var ikki longur loyvt at bryggja øl sterkari enn 2,7 prosent í Føroyum.*

bryggjaríið frá at vera ein lítil fyritøka til eitt stórt samtíðarhóskandi ídnaðarvirki. Í 1952 bygdi Einar nýggj og størri ídnaðarhøli skamt frá gamla bryggjaríinum – og upp gjøgnum fimti- og sekstiárini, vórðu hølini út- og umbygd í fleiri umførum.

## Einar yngri

Í 1968 fór sonur Einars, Einar Waag yngri, til München, har hann nam sær útbúgving sum bryggjmeistari. Tvey ár seinni, í 1970, tók hann við leiðsluni av Föroya Bjór, einans 23 ára gamal. Saman við beiggjanum Heina, átti hann bryggjaríið, men í 2008 keypti Einar Heinasa part og er nú einaeigari av fyritøkuni. Fjórða ættarlið, Annika Waag, dóttir Einar, er nú virkis- og góðskuleiðari í gamla familjubryggjarínum.




**Eyðkenda búmerkið hjá Föroya Bjór er veðrurin, sum Símun í Vági teknaði.**
Mynd: Maciej Brencz

## 74 ára oyðimarkargongd endar

Í 1980 varð tann, milt sagt, margh____ttliga føroyska rúsdrekkalógin endiliga broytt. Nú var aftur loyvt at bryggja øl sterkari enn 2,7 prosent. Tað lótu Föroya Bjór og kappingarneytin, Restorffs Bryggjarí í Havn, sær ikki siga tvær reisur. Bæði bryggjaríini sendu brátt rættuligt pilsnar- og gulløl á marknaðin – og 74 ára oyðimarkargongdin við útvatnaðum pilsnara var av.

Brátt gjørdist útboðið av øli meira fjølbroytt. Bæði bryggjaríini gjørdu royndir við ymsum ølsløgum og styrki. Men Restorffs Bryggjarí rendi seg so við og við í fíggjarligar trupulleikar og noyddist í 2007 at stongja heilt.

Föroya Bjór helt fram við vøru- og framleiðslumenningini við einum fjølbroyttum úrvali, bæði av øli og sodavatni.

Og menningin heldur fram. Í dag eigur Föroya Bjór 65% av føroyska ølmarknaðinum og 45% av sodavatnssøluni.

## Útflutningur

Föroya Bjór hevur í nøkur ár útflutt til Íslands og eigur ein góðan marknaðarpart har. Danski marknaðurin hjá Föroya Bjór er í støðugum vøkstri – og bryggjaríið er júst farið á norska marknaðin við útvaldum vørum.

Og framburðurin úti og heima kemur ikki av ongum. Ølið hjá Föroya Bjór er í heimsklassa og hevur vunnið fleiri altjóða heiðurslønir. Hesar viðurkenningar koma av høgum handverksstøði og serstøku góðskuni á føroyska vatninum.

## Umhvørvistiltøk

Í 2013 fór Föroya Bjór undir at framleiða egnar plastfløskur til sodavatnsframleiðsluna. Hetta fyri at sleppa undan at flyta stórar mongdir av tómum fløskum yvir hav og senda brúktar fløskur aftur til endurnýtslu. Og í desember 2021 bílegði Föroya Bjór eitt nýtt slag av anleggi, sum fangar meginpartin av $CO_2$ útlátinum frá ølframleiðsluni og endurvinnur tað í sodavatnsframleiðsluni.



**Bryggjaríið áðrenn 1936**

## Einar's Distillery

Seinastu árini er fyritøkan, undir framleiðaranavninum Einar's Distillery, farin undir at framleiða destilleraðar alkoholvørur. Í 2016 varð ein nýggj "pot still" (destilleringsanlegg) sett upp á bryggjarínum – og farið var undir at framleiða føroyskt akvavitt, vodka, gin, cask akvavitt, bitter og rabarbulikør. Hesar nýggju vørurnar eru vælumtóktar á føroyska marknaðinum.

Harafturat fóru tey eisini undir at framleiða whisky, men tað skal sambært ES lóggávu lagrast í minst 3 ár í eikiføtum.

Í november 2020 varð fyrsta sendingin av Single Malt Whisky boðin fram og eftirspurningurin var so stórur, at alt var útselt eftir einum tíma.

Í 2021 komu so 5 útgávur afturat, millum 500 og 1000 fløskur í hvørjari. Allar útgávurnar seldu út sama dag. Whisky serfrøðingar heima og uttanlanda hava givið føroyska whiskynum sera høgan karakter – millum 87 og 94 av 100.

*Í november 2020 varð fyrsta sendingin av Single Malt Whisky boðin fram.*

Eftirspurningurin eftir føroyskum whisky er so stórur, at bryggjaríið hevur bílagt eina nýggja "wash still" (destilleringstól).

## Tá veðrurin veksur seg størri enn bóndin

Gamli Símun í Vági hevði helst nikkað eitt sindur bilsin og viðurkennandi fram fyri seg, um hann hevði sæð hvat hansara lítla hjávinna í kjallaranum hevur ment seg til.

Veðrurin er sanniliga vaksin størri enn bóndin.

*Anker Eli Petersen*














| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Norðlýsi – Aurora borealis** | **Fyrsta føroyska bókin 200 ár** | **Sepac 2022: Drykkjuvørur** |
| **Útgávudagur:** | 28.02.2022 | 16.05.2022 | 16.05.2022 |
| **Virði:** | 19,00 og 43,00 kr. | 29,00 og 43,00 kr. | 29,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 975-976 | FO 977-978 | FO 987 |
| **Stødd, frímerki:** | 40 x 30 mm | 35,00 x 44,96 mm | 26,66 x 40,00 mm |
| **Stødd, smáark:** | | 100 x 70 mm | |
| **Myndir / listafólk:** | Thomas Vikre og Árni Øregaard | Ole Wich | Anker Eli Petersen |
| **Prentháttur:** | Offset | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Cartor Security Printing, Frakland | bpost, Belgia | bpost, Belgia |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innanoyggja brævog og brævpakki, 0-100 g. | Bræv til útheimin og innanoyggja brævpakki, 0-100 g. | Bræv innanoyggja og til útheimin, 0-250 g. |
| **Aðrar vørur:** | | | 1 postkort |








| | | |
|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Europa 2022: Flotoyggjar** | **Lívrunnin list – 3 listarkvinnur** |
| **Útgávudagur:** | 16.05.2022 | 16.05.2022 |
| **Virði:** | 19,00 og 29,00 kr. | 3 x 19,00 og 3 x 29,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 979-980 | FO 981-986 |
| **Stødd, frímerki:** | 40 x 30 mm | 26,18 x 40,00 mm |
| **Listafólk:** | Anker Eli Petersen | Astrid Andreasen, Jórunn D. Poulsen og Tita Vinther |
| **Prentháttur:** | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | bpost, Belgia | Cartor Security Printing, Frakland |
| **Postgjaldsbólkur:** | Bræv innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. | Bræv innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. |
| **Aðrar vørur:** | Sjálvklistrandi hefti við 3x2 frímerkjum | |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Martin Mörck
**Mynd:** Armagan Ozdinc
**Prent:** TrykTeam, Danmark
ISSN 1603-0036

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps

# Nýtt



## Mappa: Margreta drotning II – á trónuni í hálva øld



Í sambandi við útgávuna "Á trónuni í hálva øld" er ein snøgg mappa givin út har smáark, svartprent og fyrstadagsbjálvi eru í.

**Prísur:** 195,00 kr.

## Nýggjur svarseðil (IRC)



**Prísur:** 30,00 kr.

## Ársins frímerki 2021




1 **FO 958**
Europa 2021
Lundi




2 **FO 957**
Europa 2021
Lundi



3 **FO 964**
Cz. Slania 100 ár

Hepnu vinnararnir eru Chris Anderson úr USA, Nils Aune úr Noregi og Rainer Dettmar úr Týsklandi. Vit takka fyri luttøkuna og ynskja vinnarunum hjartaliga til lukku.

**Posta Stamps luttekur á hesum framsýningum:**
LONDON 22, Business Design Centre, 19.-26. februar, London (serstempul)
POST '22, Hornslethallerne, 26.-27. mars, Hornslet, Danmark

Posta FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi – Posta Stamps nr. 51



| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 28.02.2022 – Norðlýsi – FO 975-976 (2 frímerki)** | | | | | | |
| PPA020222 | Norðlýsi, røð óstemplað | * | 62,00 | 8,70 | | |
| FFG020222 | Norðlýsi, røð fyrstadagsstemplað | ☉ | 62,00 | 8,70 | | |
| DDG020222 | Norðlýsi, røð dagstemplað | ☉ | 62,00 | 8,70 | | |
| FFK020222 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 67,00 | 9,30 | | |
| FFL020222 | Fyrstadagsbjálvi v/einkultmerkjum | ☉ | 69,00 | 9,60 | | |
| FFM020222 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ☉ | 255,00 | 35,70 | | |
| PPB020222 | 4-bl, ovari marginal. óst. | * | 248,00 | 34,70 | | |
| PPC020222 | 4-bl, niðari marginal. óst. | * | 248,00 | 34,70 | | |
| PPD000975 | Norðlýsi, ark 19KR (20) | * | 380,00 | 53,20 | | |
| PPD000976 | Norðlýsi, ark 43KR (20) | * | 860,00 | 120,40 | | |
| **Útgáva 16.05.2022 – Fyrsta føroyska bókin 200 ár – FO 977-978 (smáark 2 frímerki)** | | | | | | |
| PPS000522 | Fyrsta føroyska bókin 200 ár, óst. | * | 72,00 | 10,00 | | |
| FFT000522 | Fyrsta føroyska bókin 200 ár, fdst. | ☉ | 72,00 | 10,00 | | |
| DDT000522 | Fyrsta føroyska bókin 200 ár, dgst. | ☉ | 72,00 | 10,00 | | |
| FFU000522 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 77,00 | 10,80 | | |
| **Útgáva 16.05.2022 – Europa 2022: Søgur og sagnir – FO 979-980 (2 frimerki + hefti)** | | | | | | |
| PPA010522 | Europa 2022, røð óstemplað | * | 48,00 | 6,70 | | |
| FFG010522 | Europa 2022, røð fyrstadagstemplað | ☉ | 48,00 | 6,70 | | |
| DDG010522 | Europa 2022, røð dagstemplað | ☉ | 48,00 | 6,70 | | |
| PPN000522 | Frímerkjahefti, óst. | * | 144,00 | 20,15 | | |
| FFO000522 | Frímerkjahefti, fdst. | ☉ | 144,00 | 20,15 | | |
| DDO000522 | Frímerkjahefti, dgst. | ☉ | 144,00 | 20,15 | | |
| FFK010522 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 53,00 | 7,40 | | |
| FFL010522 | Fyrstadagsbjálvi v/einkultmerkjum | ☉ | 55,00 | 7,70 | | |
| FFM010522 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ☉ | 199,00 | 27,80 | | |
| FFP000522 | Fyrstadagsbjálvi v/hefti | ☉ | 149,00 | 20,80 | | |
| PPB010522 | 4-bl, ovari marginal. óst. | * | 192,00 | 26,90 | | |
| PPC010522 | 4-bl, niðari marginal. óst. | * | 192,00 | 26,90 | | |
| PPD000979 | Europa 2022, ark 19KR (20) | * | 380,00 | 53,20 | | |
| PPD000980 | Europa 2022, ark 29KR (20) | * | 580,00 | 81,20 | | |

* = óstemplað, ☉= stemplað

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 16.05.2022 - Lívrunnin list - FO 981-986 (6 frímerki)** | | | | | | |
| PPA020522 | Lívrunnin list, røð óstemplað | * | 144,00 | 20,15 | | |
| FFG020522 | Lívrunnin list, røð fyrstadagsstemplað | ⊙ | 144,00 | 20,15 | | |
| DDG020522 | Lívrunnin list, røð dagstemplað | ⊙ | 144,00 | 20,15 | | |
| FFK020522 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 149,00 | 20,80 | | |
| FFL020522 | Fyrstadagsbjálvi v/einkultmerkjum | ⊙ | 159,00 | 22,30 | | |
| FFM020522 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ⊙ | 591,00 | 82,70 | | |
| PPB020522 | 4-bl, ovari marginal. óst. | * | 576,00 | 80,60 | | |
| PPC020522 | 4-bl, niðari marginal. óst. | * | 576,00 | 80,60 | | |
| PPD000981 | Lívrunnin list, ark 19KR (20) | * | 380,00 | 53,20 | | |
| PPD000982 | Lívrunnin list, ark 29KR (20) | * | 580,00 | 81,20 | | |
| PPD000983 | Lívrunnin list, ark 19KR (20) | * | 380,00 | 53,20 | | |
| PPD000984 | Lívrunnin list, ark 29KR(20) | * | 580,00 | 81,20 | | |
| PPD000985 | Lívrunnin list, ark 19KR (20) | * | 380,00 | 53,20 | | |
| PPD000986 | Lívrunnin list, ark 29KR (20) | * | 580,00 | 81,20 | | |
| **Útgáva 16.05.2022 – Sepac 2022: Drykkjuvørur – FO 987 (1 frímerki)** | | | | | | |
| PPA000987 | Sepac 2022, røð óstemplað | * | 29,00 | 4,00 | | |
| FFG000987 | Sepac 2022, røð fyrstadagsstemplað | ⊙ | 29,00 | 4,00 | | |
| DDG000987 | Sepac 2022, røð dagstemplað | ⊙ | 29,00 | 4,00 | | |
| PPJ000522 | Postkort (1) | * | 10,00 | 1,40 | | |
| FFJ000522 | Maksimumkort (1) | ⊙ | 39,00 | 5,45 | | |
| FFK000987 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 34,00 | 4,80 | | |
| FFL000987 | Fyrstadagsbjálvi v/einkultmerkjum | ⊙ | 34,00 | 4,80 | | |
| FFM000987 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ⊙ | 121,00 | 16,90 | | |
| PPB000987 | 4-bl, ovari marginal. óst. | * | 116,00 | 16,20 | | |
| PPC000987 | 4-bl, niðari marginal. óst. | * | 116,00 | 16,20 | | |
| PPD000987 | Sepac 2022, ark 29KR (20) | * | 580,00 | 81,20 | | |
| **Ymiskt** | | | | | | |
| WDROTNG50 | Mappa: Á trónuni í hálva øld | | 195,00 | 27,30 | | |
| WSVARSED4 | Svarseðil 2022 | * | 30,00 | 4,20 | | |
| WLONDON22 | Serstempul: LONDON’22 | ⊙ | 31,00 | 4,30 | | |
| | | | | | | |
| | **Avgreiðslugjald:** | | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur í alt:** | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri >

**Kunning um gjald við gjaldskorti**

Altjóða trygdarásetingin, sonevnda "2-parta-góðkenningin" ger, at vit ikki kunnu handfara gjaldskort eins og áður.

Í staðin bjóða vit eina trygga loysn, har tú kanst rita inn á okkara heimasíðu og skráseta títt gjaldskort. Á hendan hátt kanst tú lætt og trygt gjalda fyri bæði tíni framtíðar hald eins og fyri einkultar bíleggingar.

Tað ber tó eisini til at bíleggja frímerki á www.stamps.fo og gjalda við gjaldskorti uttan at kortið verður skrásett.

Nýggjar útgávur eru vanliga tøkar at bíleggja umleið ein mánaða fyri útgávudagin.

**Gjaldshættir**

☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps

Vinarliga upplýs kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

Allar vørur kunnu lættliga bíleggjast á heimasíðu okkara www.stamps.fo. Gjaldast skal við gjaldskorti og vøran verður send við postinum.

Navn:

Bústaður:

Postnr./Býur:

Land:

Teldupostur:

Kundanr.:

☐ Ja, takk. Eg vil fegin fáa tíðindaskriv umvegis teldupost.

**Posta Stamps**
**Óðinshædd 2**
**100 Tórshavn**

**Tlf. 346200**

**stamps@posta.fo**
**www.stamps.fo**

PS2022